†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Elsebeth Maria Sivertsen**

ættað úr Mikladali

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 14. mai, 79 ára gomul.

Kistan fer úr Ebenezer fríggjadagin kl. 15.30. Jarðarferðin verður úr Betesda í Klaksvík leygardagin kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*

**Hans, Elsa, Jórun, Palli og Fríðgerð**

Tey, ið vilja minnast Elsebeth Mariu, kunnu lata eina peningagávu til barnalegurnar í Grønlandi, konto í Føroya Banka.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Løgtingsstjórin fyllir hálvthundrað



*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Løgtingsstjórin Súsanna Danielsen arbeiddi bara ein dag sum 49 ára gomul í nýumbygda løgtinginum. Í dag fyllir Súsanna 50 ár og hon er í besta aldri at manna ein so krevjandi sess, sum stjóri á løgtingsskrivstovuni. Seinastu 22 árini hevur hon meginpartin av tíðini virka sum embætismaður í politiska lívinum í Føroyum.Hon kennir sniðvegirnar, hon kennir lúnirnar hjá politikkarunum, hon kennir hvussu teir hugsa. Og hvussu snýgur hon sær so millum allar hanarnar á tingi, tí tingið er mest menn. Hon er bestemt, hon veit hvat hon vil og so hevur hon arvað víðagitna og sjarmerandi smílið hjá pápanum Dánjal Paula í Búðini av Velbastað. Móðir Súsannu var Hella, ein sterk kvinna, sum doyði elligomul í fyrraárið. og hon var systir navnframa Jørgen Frans Jacobsen, rithøvunda. Ommubeiggin úr Famjin teknaði føroyska flaggið.

Súsanna tók studentsprógv í 1971, løgfrøðiligt embætisprógv, cand jur. í 1980 og so byrjaði starvsleiðin í føroyskari fyrisiting. Var fulltrúi í landsstýrinum fram til 1986. Síðan deildarleiðari á lønardeildini hjá landstýrinum fram til 1996. Her stóð hon á odda fyri teimum mangan krevjandi lønarsamráðingunum, eitt hart og slítandi starv.. Hon hevur verið løgtingsstjóri síðan 1996. Súsanna hevur havt onnur álitisstørv. Verið formaður í Javnstøðunevndini og í stýrinum fyri Arbeiðsloysistryggingina.

**Vikuskifti í Danmark**

Prísur fyri hvønn

Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram 1.815,-

Føroyar-Billund aftur og fram 1.853,-

(Ferðaavgjøld eru íroknað prísin)

Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.

Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á **www.maersk-air.dk**

MAERSK AIR
It's got to be perfect

# Restorff tørvar øldrekkarar

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Restorff Bryggjarí søkir eftir 250 øldrekkarum at royna nýggja bjórið Tjóðarbjór, sum verður latið á marknaðin í morgin. Ølið er bryggjað av einslitum og hevur staðið og prutla meðan hevur verið á valið og meðan roynt hevur verið at skipa nýggja samgongu til at stýra føroysku tjóðini.

Restorff vil hava fólk at vitja bryggjaríið í dag og kravið til tey vitjandi er, at tey dáma væl øl. Fólk kunnu melda seg við at ringja til bryggjaríið.



**Bussferðir**



**til Noregs**
**17.06. - 26.06.**
**Vitjað verður**
**m.a. í Gudvangen,**
**Lærdal, Lillehammer, í Gudbrandsdalinum, í Lom, Geirenger, við Sognefjørðin, Balestrand og Bergen**

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við handvaski, 7 nætur á hotellum í dupultkamari v. WC/bað, íroknað ½ vistarhald. Hartil føroyskur bussur og ferðaleiðari.

**úr 5.795,-**

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

team85

## Eskild Poulsen Nólsoy til minnis

*Mamman og pápin við vøgguna stóðu,*
*fittari nýføðing ikki tey sóu.*
*Gleði og lukku í heiminum spreiddi,*
*pápin so stoltur í túni teg leiddi.*

*Spældi við systkin og javnaldrar tínar,*
*umstøður hevði í heiminum fínar.*
*Dreymar og vónir foreldrini høvdu,*
*hvønn dag í Guðs hond tey bæði teg løgdu.*

*Bønirnar mangar til skaparin sendu,*
*dagliga til hans við vónum sær vendu.*
*Løgdu teg fram fyri hansara náði,*
*hann sum á fløkjunum einans veit ráðið.*

*Fekk ei í lívi so lættgongda rók,*
*lívið so mangan eitt tak við teg tók.*
*Skapaður var tó í hansara mynd,*
*sum yvir krossin tók á seg vár synd.*

*Nú hvílir likamið innanvert liðið,*
*har einki menniskja sjálvt hevur stigið.*
*Mitt millum fedrar í undan tær fóru,*
*øll hava felags, at onnur tey bóru.*

*Hvíl góði Eskild í friði og náðum,*
*har ei er munur á høgum og lágum,*
*inntil tín skapari aftur ein dag,*
*leiðir teg inn til sín himmalska stað.*

Við samkenslu.

**SPG.**



